# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 11. august 2009





Jákup Mikkelsen er klárur, sigur Jens Martin Knudsen, men tað er Gunnar Nielsen eisini, so Brian Kerr hevur eitt slag av luksustrupulleika, nú málverji skal veljast til dystin í annaðkvøld

# Jákup er klárur

**Jákup Mikkelsen hevur verið meiri enn hálvskaddur seinastu tíðina, men hann hevur vant við fullari ferð nú landsliðið hevur fyrireikað seg. Spurningurin er nú, um valið fellur á hann ella Gunnar Nielsen, tá liðið skal setast til í annaðkvøld**


FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*


Jákup Mikkelsen hevur ikki verið meiri enn hálvur seinastu dystirnar. Í móti EB/Streymi var hann als ikki við, og tá hann vardi málið í móti KÍ hóskvøldið, var hann als ikki 100 prosent.

Jens Martin Knudsen, ið er ein av hjálparvenjarunum hjá Brian Kerr, landsliðsvenjara, vildi tó í morgun vera við, at støðan var góð hjá báðum málverjunum.

– Eftir teimum venjingunum, sum hava verið, er Jákup Mikkelsen púra klárur, segði Jens Martin Knudsen. Tað sama er Gunnar Nielsen, so talan vera um javna og harða kapping um málverjaplássið.

– Vit eru í eini góðari støðu har, segði Jens Martin Knudsen við Rás2 fyrrapartin.

## Gunnar ella Jákup

Stóri spurningurin er so, hvønn Brian Kerr, landsliðsvenjari, velur at satsa uppá. Jákup Mikkelsen hevur roynst landsliðnum øgiliga væl, men á dópsbrævinum stendur, at hann verður 39 ára gamal fríggjadagin.

Hetta merkir samstundis, at hann hevur royndir sum eingin annar, men spurningurin er, um Brian Kerr ynskir at halda fast í Jákupi Mikkelsen, ella um hann ynskir at markerað sína komu sum landsliðsvenjari við einum skifti á tí plássinum, har mest ágangur er, tá landsliðið spælir.

Seinast Brian Kerr hevði ábyrgdina av landsliðnum, loysti hesin trupulleiki seg sjálvan, tí Gunnar Nielsen var ikki tøkur tá. Tað var Gunnar Nielsen hinvegin, tá Føroyar spældu venjingardyst í móti Íslandi. Tá fekk hann fyrstaval, meðan Heðin Askham, sum tá hevði ábyrgdina av landsliðnum, valdi fullkomiliga at síggja burtur frá roynda klaksvíkinginum.

– Vit kunnu ikki hava ein málmann, sum kanska er í heimsklassa, sitandi á bonkinum, segði Heðin Askham tá. Spurningurin er, um Brian Kerr er av somu sannføring.

Greitt er tó, at tað er avmarkað við spælitíð hjá 22 ára gamla málverjanum, sum er knýttur at enska felagnum Manchester City.

Evnini fornokta seg tó ikki – tað hevur verið greitt leingi. Veruleikin er tó eisini tann, at Jákup Mikkelsen hevur spælt 62 landsdystir. Fýra av teimum í móti Fraklandi.

## Dystirnir í móti Fraklandi:

*08.09.04:*
**Føroyar-Frakland 0-2 (0-1)**
0-1: Ludovic Giuly 32.
0-2: Djibrill Cisse 73.

*03.09.05:*
**Frakland-Føroyar 3-0 (2-0)**
1-0: Djibril Cisse, 13.
2-0: sjálvmál (Súni Olsen), 18.
3-0: Djibril Cisse, 76.

*11.10.06.:*
**Frakland-Føroyar 5-0 (2-0)**
1-0: Louis Saha, 1.
2-0: Thierry Henry, 22.
3-0: Nicolas Anelka, 76.
4-0: David Trezeguet, 77.
5-0: David Trezeguet, 84.

*13.10.07.:*
**Føroyar-Frakland 0-6 (0-2)**
0-1: Nicolas Anelka 6.
0-2: Thierry Henry 8.
0-3: Karim Benzema 50.
0-4: Jérôme Rothen 66.
0-5: Karim Benzema 81.
0-6: Hatem Ben Arfa 90.